UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ
INNANHÝSIS

Dagf. 12.02.2020
J.Nr.: 20/00462
Viðgj.: SPS

Hoyringarnotat. Uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin)

Umhvørvis- og vinnumálaráðið sendi tann 8. januar 2020 uppskotið til hoyringar hjá myndugleikum og feløgum, sbr. hoyringslistan síðst í notatinum. Hoyringsfreistin varð sett til 30. januar 2020.

Hesir myndugleikar og feløg fingu uppskotið til hoyringar:
Fíggjarmálaráðið, Løgmansskrivstovan, Landsbankin, Dátueftirlitið, Tryggingareftirlitið, Skráseting Føroya, Vinnuhúsið, Felagið Peningastovnar, Handilsvinnufelagið, Felagið hjá advokatum, Felagið Føroyskir Gannskoðarar, P/F Betri Pensjón, P/F Tryggingarfelagið Lív (Lív 2), P/F NordikLív Lívstryggingarfelag, Ognarmeklarafeløg, Eftirlønargrunnur Føroya Arbeiðarafelags, Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelags.

Hesir myndugleikar og feløg hava latið viðmerkingar til uppskotið:
Tryggingareftirlitið, Skráseting Føroya, P/F Tryggingarfelagið Lív (Lív) P/F Betri Pensjón, P/F NordikLív Lívstryggingarfelag, BankNordik, Felagið Føroyskir Grannskoðarar (FFG).

Fíggjarmálaráðið, Landsbankin og Vinnuhúsið høvdu ikki viðmerkingar til uppskotið.

Í innkomnu hoyringarsvarunum varð í høvuðsheitum tikið undir við lógaruppskotinum og við endamálinum við lógaruppskotinum, at tryggja, at Føroyar viðvirka í altjóða stríðnum móti hvítvasking av pengum og fígging av yvirgangi.

Flestu av innkomnu viðmerkingunum vóru lógartekniskar viðmerkingar og aðrar rættingar, sum ikki hava týðandi innihaldsligar broytingar við sær. Hesar eru í flestu førum tiknar til eftirtektar, og er uppskotið rættað samsvarandi. Niðanfyri verður innihaldið í innkomnu hoyringssvarunum, sum viðvíkja lógartekniskum viðmerkingum, tí ikki endurgivið.

Niðanfyri eru gjørdar viðmerkingar til horingarsvarini frá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar og P/F Tryggingarfelagið Lív (Lív).

Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Til § 5
Felagið tekur undir við broytingunum í kontantgjaldsbanninum, undir hesum at markið verður sett niður frá kr. 100.000 til kr. 50.000.

Tilmæli: FFG vil mæla til, at undantakið eisini verður galdandi fyri tey vinnurekandi, sum eru fevnd av § 1, stk. 1 í "Anordning om ikraftræden for Færøerne af lov om forebyggende

foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven)", eisini nevnd hvítvaskfyriskipanin í viðmerkingunum til hetta lógaruppskotið.

Áheitan: FFG vil harafturat heita á viðkomandi myndugleikar um at upplýsa vinnurekandi væl um lógarbroytingina og um kontantgjaldsbannið í síni heild.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins
Undantakið er sett inn í uppskotið.

Vinnurekandi verða kunnað væl um lógarbroytingina og um kontantgjaldsbannið í síni heild.

6, stk. 1 – Váðameting
Felagið mælir til, at SNRA (Supranational Risk Assessment, vanliga stytt SNRA) ikki verður ein tvungin partur av grundarlagnum hjá føroyskum fyritøkum, tá hesar skulu gera sínar váðametingar sbrt. § 6, stk. 1.

Felagið mælir til at taka málið um eina serstaka váðameting av Føroyum upp við danskar myndugleikar og fáa hesa gjørda, soleiðis at føroyskar fyritøkur, fevndar av hvítvasklóggávuni, fáa eitt betri og eitt meira viðkomandi grundarlag at arbeiða út frá, samstundis sum fyritøkurnar lættari kunnu málrætta sín innsats á økinum. Hetta hava føroyskir myndugleikar møguleika fyri at fáa í lag í samstarvinum við Dansk HvidvaskForum, sum víst á omanfyri.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins
Mett verður, at tað ikki gongur fram av viðmerkingunum il lógaruppskotið, at SNRA skal verða ein tvungin partur av grundarlagnum hjá føroyskum fyritøkum, tá hesar skulu gera sínar váðametingar sbrt. § 6, stk. 1.

Spurningurin um at taka málið um eina serstaka váðameting av Føroyum upp við danskar myndugleikar er ikki viðgjørdur í sambandi við fyrireiking av uppskotinum.

Til § 17
Felagið metir tað hava stóran týdning, at yvirlitið, sbrt. § 17, stk. 7 í lógaruppskotinum yvir politiskt ábærar persónar her á landi, er klárt og tøkt í so góðari tíð sum gjørligt, áðrenn lógin kemur í gildi. Hetta soleiðis, at fyritøkur, fevndar av lógini, kunnu fyrireika seg so væl sum gjørligt til herdu krøvini, áðrenn lógin kemur í gildi. Harumframt er tað umráðandi, at yvirlitið verður dagført, so hvørt broytingar henda.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins

Víst verður til viðmerkingarnar í uppskotinum um henda spurningin:
"Eftir § 17, stk. 7, skal landsstýrismaðurin gera ein lista við nøvnum á politiskt ábærum persónum. Listin skal vera alment atkomuligur. Eftir stk. 8 í uppskotinum ásetur landsstýrismaðurin reglur um gerð av listanum, undir hesum um fráboðanarskyldu hjá stovnum o.a. í sambandi við gerð av listanum og almannakunngering.

Eftir § 18, stk. 7, í hvítvaskfyriskipanini skal danski vinnumálaráðharrin gera ein lista við nøvnum á politiskt ábærum persónum. Ætlanin er, at danski vinnumálráðharrin við heimild í § 18, stk. 8, í hvítvasfyriskipanini setur í gildi "Bekendtgørelse om indberetning og offentliggørelse af oplysninger om politisk eksponerede personer på Færøerne."

Listin, sum dansk vinnumálaráðharrin ger eftir § 18, stk. 7 í hvítvaskfyriskipanini, og listin sum landsstýrismaðurin ger eftir § 17, stk. 7 í uppskotinum, fevna um somu stovnar o.a. og somu persónar. Ætlanin er tí, at landsstýrismaðurin tí kann nýta heimildina í § 17, stk. 8 soleiðis, at víst verður til listan, sum danski vinnumálaráðharrin hevur gjørt við heimild í § 18, stk. 8, í hvítvasfyriskipanini."

§§ 32 – Whistleblowerskipan
Felagið mælir til, at markið fyri nær ein vinnurekandi, sum er fevndur av § 1 stk. 1, nr. 6-10 í lógaruppskotinum, skal hava eina innanhýsis whistleblowerskipan, verður hækkað munandi.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins
Skipanin verður eftir uppskotinum nýtt fyri fyritøkur og persónar, sum hava fleiri enn 5 starvsfólk. Samsvarandi áseting er í § 35 í Anordning nr. 813 af 12. august 2019 om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven), sum m.a. fevnir um advokatar. Markið eigur at vera tað sama í báðum lógum.

§ 60. Gildiskoma
Tilmæli: FFG vil tí mæla til, at gildiskomudagurin verður útsettur til 1. januar 2021, soleiðis at fyritøkurnar fáa betri stundir at fyrireika seg til nýggju og herdu krøvini.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins
Aftaná hoyringina er gildiskoma sett til 1. januar 2021

Lív

Generellar viðmerkingar

Yvirskipað metir Lív, at lógaruppskotið ásetur krøv, ið als ikki standa mát við váðan á føroyska pensjóns- og lívstryggingarøkinum.

Víst verður á, at at føroyska pensjónsøkið í stóran mun er merkt av avtalum á arbeiðsmarknaðinum, sum eru tengdar at løgtingslóg nr. 49 frá 14. mai 2013 um eftirløn (eftirlønarlógin), sum setur nágreiniliga mannagongd fyri, hvussu eitt eftirlønargjald verður inngoldið og útgoldið. Lív metir tí, at tað sýnist óhugsandi, at skipanin verður misnýtt til hvítvask ella fígging av yvirgangi.

Lív mælir til, at eftirlønar- og lívstryggingarfeløg einans eru fevnd av lógaruppskotinum fyri tær pensjónir, sum ikki eru liður í starvssetan og sum ikki eru fevndar av eftirlønarlógini.

Eisini metir Lív, at lógaruppskotið verður ein umfatandi umsitingarlig byrða fyri eftirlønarveitarar, og sigur, at krøv verða sett til manuellar mannagongdir og økta umsiting. Víst verður á, at ein talgildur samleiki, eins og vit kenna við t.d. NemlD, hevði lætt munandi um gjøgnumførslu av kundakunnleikamannagongdunum, sum uppskotið krevur. Lív mælir til, at uppskotið verður útsett, til føroyingar hava fingið tillutað ein talgildan samleika, eins og ætlað í sambandi við verkætlanina Talgildu Føroyar.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins

LÍV er longu fevnt av galdandi hvítvasklóg og krøvum eftir lógini.

Løgskipanin av økinum eftir uppskotinum broytist frá at vera ein í høvuðsheitum reglubundin skipan til at vera meira váðagrundað. Tað ger, at virksemið bæði hjá fyritøkum og persónum og myndugleikum kann verða meira miðvíst og virkið soleiðis, at virksemið verður nýtt, har váðin fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi er størstur.

Eftir galdandi reglum er tað kundakunnleikamannagongdin, sum er mest tyngjandi í dagliga rakstrinum. Krøvini hava við sær, at fyritøkan skal kenna sínar kundar fyri at meta um, hvør váði fyri hvítvasking ella fígging av yvirgangi er knýttur at einstaka kundanum.

Eftir uppskotinum verður tað latið til fyritøkurnar at gera eina meting soleiðis, at kundaviðurskifti við lítlum váða ikki hava við sær somu tyngjandi krøv sum kundaviðurskifti við størri váða.

Sum víst á í almennu viðmerkingunum til uppskotið, hava Føroyar, sum partur av altjóða samstarvinum innan karmarnar av FATF (Financial Action Task Force), skyldu til at tryggja, at FATF-tilmælini verða framd í føroyskari lóggávu.

Eisini er í almennu viðmerkingunum til uppskotið víst á, at í grannalondunum eru FATF-tilmælini framd innan karmarnar av 4. hvítvaskdirektivinum, at uppskotið byggir á hvítvaskfyriskipanina og ásetingarnar í uppskotinum og tí eisini eru innan fyri karmarnar av 4. hvítvaskdirektivinum. Hetta er gjørt fyri at tryggja, at føroyska lóggávan er í samsvari við FATF- tilmælini soleiðis, at tað slepst undan atfinningum frá altjóða eftirlitsstovnum á økinum, sum kunnu hava óhepnar avleiðingar fyri føroyska fíggjargeiran.

Í uppskotinum, sum varð sent til hoyringar, var í § 1, stk. 3 ásett, at reglur um lóg heilt ella partvíst ikki skulu verða nýttar fyri fyritøkur og persónar, sum vinnuliga útinna virksemi viðvíkjandi veitan av lánum við skrásettum panti í fastogn ella í skipum við støði í útgávu av lánsbrøvum, um nevnda virksemi bert verður útint í avmarkaðan mun.

Ásetingin samsvarar við § 1, stk. 3 hvítvaskfyrskipanini, anordning nr. 813 af 12. august 2019 om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven).

Í uppskotinum til lógina, 2016/1 LSF 41, sum heimilar, at hvítvaskfyriskipanin frá 2019 er sett í gildi í Føroyum, verður í viðmerkingunum til § 1, stk. 3, m.a. sagt:

"Den foreslåede bestemmelse gennemfører artikel 2, stk. 3, i 4. hvidvaskdirektiv. Det vil kun være muligt at undtage en fysisk eller juridisk person, hvis seks kumulative betingelser er opfyldt. Der kan alene ske fravigelser af loven på områder, hvor der er begrænset risiko for hvidvask og finansiering af terrorisme, samt hvor en aktivitet er lejlighedsvis eller udøves i meget begrænset omfang."

Tað er tí ikki í samsvari við 4. hvítvaskdirektiv at eftirlønar- og lívstryggingarfeløg einans eru fevnd av lógaruppskotinum fyri tær pensjónir, sum ikki eru liður í starvssetan og sum ikki eru fevndar av eftirlønarlógini. Føroyar eru ikki bundnar av direktivinum, men um lóggávan ikki er í samsvari við direktivið, kann tað skapa iva um, hvørt føroyska lóggávan er í samsvari við

FATF tilmælini, og, sum nevnt, kann tað hava við sær atfinningar frá altjóða eftirlitsstovnum á økinum, sum kunnu hava óhepnar avleiðingar fyri føroyska fíggjargeiran.

Lív. Aðrar viðmerkingar og broytingaruppskot
Aðrar viðmerkingar og broytingaruppskot verða endurgivin niðanfyri, og hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið gjørt viðmerkingar til tað, sum eisini framganga niðanfyri.

§ 1, stk. 3 í uppskotinum, sum varð sent til hoyringar:

Viðmerkingar LÍV
LÍV metir, at váðin fyri hvítvaski og figging av yvirgangi er so mikið avmarkaður fyri tvungnar pensjónsskipanir, at hann svinnur burtur í einki. Tað sýnist tískil ikki neyðugt, at krøv verða sett, sum eru marknaðinum til stóran fíggjarligan bága, um váðin ikki er samsvarandi.

LÍV mælir tí til, at heimildin í § 5, stk. 3 í uppskotinum, sum varð sent til hoyringar, verður víðkað soleiðis, at Tryggingareftirlitið fær heimild at áseta reglur um, at lógin partvís ikki skal galda fyri lívstryggingarfeløg.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins
Víst verður til generellu viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins omanfyri.

§ 2, nr. 7: Tættur samstarvsfelagi við ein persón, sum er politiskt ábærur:

Viðmerkingar LÍV:
"Allýsingin av tøttum samstarvsfeløgum við politiskt ábærar persónar, ið skal skiljast í sambandi við § 17 um serligar kundakunnleikamannagongdir, tykist vera ógvuliga breið. Smáu viðurskiftini í Føroyum hava við sær, at tað gerst trupult at avmarka skarðan av f6lki, ið hava tilknýti til tann politiskt ábæra. Eitt tingfólk kann t.d. hava eina fyritøku afturat tingsessinum og er tað av teirri orsøk eyðsæð, at viðkomandi hevur tætt handilsligt samstarv við aðrar persónar. Til tess at eyðmerkja øll slik samstarvsbond liggur eitt stórt kanningararbeiði hjá eftirlønarveitaranum. Harumframt setur ásetingin stór krøv til Tryggingareftirlitið, sum eftirlitsmyndugleika."

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins:

Fyritøkur, fevndar av lógini, hava longu í dag eftir galdandi lóg skyldu at eyðmerkja útlendskar politiskt ábærar persónar og teirra nærstandandi umframt tættar samstarvspartar.

Tað nýggja er, at frameftir skulu fyritøkurnar eisini eyðmerkja politiskt ábærar innlendskar persónar o.a.

Danska Finanstilsynet hevur gjørt "Vejledning om politisk eksponerede personer" , https://www.finanstilsynet.dk/~/media/Tal-og-fakta/2018/PEP/Vejledning-til-reglerne-om-politisk-eksponerede-personer-010218-pdf.pdf?la=da

Eisini føroyskar fyritøkur kunnu nýta hesa vegleiðing, sum ger tað lættari hjá fyritøkunum at fáa upplýsingar um, hvussu reglurnar um politiskt ábærar persónar í praksis skulu handfarast. Vegleiðingin skal m.a. hjálpa fyritøkunum at kunna eyðmerkja politiskt ábærar persónar o.a.

Harumframt verður gjørd kunngerð um tey størv í Føroyum, sum hava við sær, at ein persónur, sum hevur slíkt starv, skal metast sum politiskt ábærur sbrt. nýggju hvítvasklógini. Finanstilsynet fer við heimild í hvítvaskfyriskipanini at seta samsvarandi kunngerð í gildi fyri fyritøkur, sum virka á ikki yvirtiknum málsøkjum, og lista yvir politiskt ábærar innlendskar persónar o.a. Hesin listin verður eisini nýttur av fyritøkum, sum virka á yvirtiknum málsøkjum. Ein slíkur listi fer eisini at hjálpa fyritøkunum at eyðmerkja politiskt ábærar persónar og teirra nærstandandi umframt tættar samstarvspartar.

Víst verður annars til generellu viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins omanfyri.

§ 3: Hvítvask

Viðmerkingar LÍV:
"Í uppskotinum verður nágreinað, at skattaundandráttur er fevndur av allýsingini hvítvask. Lív metir tað ikki vera nóg greitt, hvat felagið skal geva sær far um i hesum sambandi. Sostatt hevði verið hent hjá Lív at fingið útvega dømi um, hvussu skattaundandráttur kann koma fyri á pensjóns- og livstryggingarøkinum."

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins:
Ásetingin í § 3 í uppskotinum, sum er orðað einsljóðandi við § 3 í hvítvasfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt. Í viðmerkingunum til § 3 verður víst til viðmerkingarnar til § 3 í 2016/1 LSF 41 Forslag, sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið.

Eyðmerkt fyri hvítvasktransakjónir er, at tær gjøgnum eina dyljingarprosess hava til endamáls at dylja hvar peningurin ella ognirnar, sum eru úrslitið av eini revsiverdari gerð, koma frá.

Viðvíkjandi spurninginum um, hvussu skattaundandráttur kann koma fyri á pensjóns- og lívstryggingarøkinum, verður víst til vegleiðing fra Finantilsynet, s. 29 (Finanstilsynets vejledning om lov om forebyg-gende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven) https://www.finanstilsynet.dk/~/media/Tilsyn/hvidvask/Vejledning-til-hvidvaskloven-oktober-2018.pdf?la=da.

"Pensionsordninger oprettet som led i ansættelsen oprettes altid via arbejdsgiver. Det er arbejdsgiver, som indbetaler både arbejdsgiverens og arbejdstagerens bidrag til pensionsordningen.

Der er generelt set derfor en meget begrænset risiko for, at obligatoriske pensionsordninger oprettet som led i et ansættelsesforholdet kan anvendes til hvidvask. Dette billede ændres ikke, selvom ordningen giver muligheder for supplerende frivillige indbetalinger og evt. genkøb, hvilket primært kan begrundes med beskatningsmæssige forhold. Det er pensionsforsikringsselskabet der sørger for at afregne arbejds-markedsbidrag ved indbetaling af skat eller afgifter ved udbetaling.

For pensionsordninger, der ikke er skattebegunstigede, er der en højere risiko for, at disse kan blive udnyttet til hvidvask end skattebegunstige ordninger.

Som et eksempel på en ikke-skattebegunstiget ordning er en pensionsordning efter pensionsbeskat-ningsloven § 53 A, såkaldte § 53 A ordninger. § 53 A ordninger anvendes ofte

i forbindelse med udstationering og lignende, hvor en medarbejder fort-sætter sine indbetalinger på en tidligere arbejdsgiverindbetalt ordning, men ikke længere har en indkomst i Danmark at anvende fradraget i. Ordningen kan dog også tegnes privat, men ordningen er mindre attraktiv for personer, der er skattepligtige i Danmark.

Da der er tale om beskattede midler, som derfor ikke skal beskattes på udbetalingstidspunktet, står det forsikringstager og pensionsselskab friere eventuelt at aftale en kortere løbetid for udbetalingen. Heri ligger der således en risiko for, at pensionstageren søger at udnytte indbetalinger på ordningen til hvid-vask af midler, som hidrører fra kriminel aktivitet, herunder skatteunddragelse. Dette sammenholdt med en mulig kortere løbetid gør, at ordningen kan være mere attraktiv til forsøg på hvidvask end øvrige pensionsprodukter."

Hesa vegleiðing kunnu føroyskar fyritøkur eisini
nýta.

§ 6, stk. 3: Undantøka frá kravinum um váðameting

Viðmerkingar LÍV:

"Sbrt. viðmerkingunum til $ 6, stk. 3, verdur víst til donsku viðmerkingarnar til § 7, stk. 3. Her framgongur, at dømi um undantak kundi verið fyri tvungnar pensjónstryggingar, sum eru stovnaðar í sambandi við starvssetan. Víst verdur til eftirlønarlógina og treytirnar í § 1, stk. 1, at eftirlønargjald skal rindast av øllum A- og B inntøkum. Hetta merkir, at meginparturin av føroyskum pensjónsgjøldum er tvungin.

Eins og greitt frá omanfyri, ásetur lógin nágreiniligar reglur fyri, nær og hvussu ein pensjón kann verða útgoldin, sbrt. § 9, stk. 1 og 2. Umframt vantandi ræði á samansparingini verður pensjónsgjaldið forskattað við millum 30 – 40%, sbrt. 5 12, stk. 2. Hetta merkir eisini, at TAKS kann eyðmerkja eftirlønarsamanspararar við p-tali beinanvegin, og tískil er ikki møguligt at gera dulnevndar flytingar. LÍV metir, at atlit átti at verið tikið til hesi viðurskifti.

LÍV metir tað vera í tráð við endamálið við § 6, stk. 3, at undantaksmøguleikin viðvíkjandi váðameting verður nýttur til tvungnar pensjónsskipanir. Í sama viðfangi ynskir LÍV, at ein kunngerð fær virknað samstundis sum lógaruppskotið."

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins
Tað framgongur av § 6, stk. 1 í uppskotinum til nýggja hvítvasklóg, at fyritøkur og persónar, fevnd av uppskotinum, skulu eyðmerkja og meta um váðan fyri, at fyritøkan ella persónurin kunnu verða misbrúkt til hvítvask ella fígging av yvirgangi. Váðametingin skal gerast við støði í handilsmodellinum hjá fyritøkuni ella persóninum og skal fevna um metingina av vágafaktorum, sum eru knýttir at kundum, vørum, tænastum og transakjónum umframt veitingarkanalir og lond ella landafrøðilig øki, har handilsvirksemi er. Váðametingin skal skjalprógvast og støðugt dagførast.

Av viðmerkingunum til § 6 í uppskotinum framgongur, at ásetingin, sum er orðað einsljóðandi við § 7 í hvítvaskfyriskipanini, skal skiljast á sama hátt, og í viðmerkingunum verður víst til viðmerkingarnar til § 7 í 2016/1 LSF 41 sbr. fylgiskjal 1 til uppskotið. Viðmerkingarnar til § 7 í 2016/1 LSF 41 eru tí á sama hátt sum aðrar viðmerkingar til lógaruppskot tulkingaríkast til uppskotið § 6 í uppskotinum til nýggja hvítvasklóg.

Eftir § 6, stk. 3 í uppskotinum til nýggja hvítvasklóg kann landsstýrismaðurin áseta reglur um undantøk frá krøvunum í stk. 1.

§ 6 stk. 3 í uppskotinum er orðað einsljóðandi og § 7, stk. 3 í hvítvasfyriskipanini.

Av viðmerkingunum til § 7, stk. 3 í 2016/1 LSF 41 gongur fram, at heimildin at undantaka eftir stk. 3 frá krøvunum í stk. 1 kann verða nýtt á økjum, har teir serligu váðar í sambandi við geiran eru einfaldir, og har tað sum fylgja av tí í viðkomandi vinnugrein er ein greið fatan av hesum. Tað kann t.d. vera viðkomandi í sambandi við tvungnar penjónsskipanir, stovnsettar í sambandi við starvssetan.

Reglur um undantak frá stk. 1 merkir sostatt, at fyritøkur og persónar, fevnd av undantaksreglum, skulu leggja ta í viðkomandi vinnugrein greiðu fatan av váðanum sum grund fyri váðastýring í sambandi við íverksetan av váðametingini í skrivligum politikkum, mannagongdum og eftirlit sambært § 7 og 8. Íverksetan av stk. 3 er sostatt eitt undantak frá kravinum um eina individuella váðameting, men ásetingin kann ikki verða nýtt til at áseta undantøk frá krøvum í lógini annars.

Í løtuni ber ikki til at taka støðu til, hvussu heimildin í stk. 3 at undantaka frá stk. 1 verður nýtt, men møgulig íverksetan av heimildini verður framd í samstarvi við fyritøkur, sum vilja hava undantak og viðkomandi myndugleikar.

Heimildin at undantaka frá stk. 2 er ætlað serliga at verða nýtt í sambandi við smáar fyritøkur, sum ikki annars eftir aðrari lóggávu skulu hava serligar lyklapersónar, og har tílíkt krav verður mett at verða ov tyngjandi.

§ 7, stk.4: lnnanhýsis grannskoðan og eftirlit

Viðmerkingar LÍV:

Sambært ásetingini skal møguligt innanhýsis egið eftirlit meta um tiltøkini sbrt. § 7, stk. 1. Í vimerkingunum framgongur ikki, hvat liggur í hesum hugtakinum. LÍV er av teirri fatan, at hetta svarar til internu auditfunksjónina, sbrt. § 21 í kunngerð nr. l frá 27. juni 2018 um leiðslu og stýring av tryggingarfeløgum o.a. (Leiðslukunngerðin). LÍV ger vart við, at somu krøv ikki finnast í § 8, stk. 4 í Anordning no. 813 af 12. august 2019 om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme, sum er galdandi fyri fyritøkur undir eftirliti av Fíggjareftirlitinum. Ynskiligt er, at miðað verður eftir, at krøvini samsvara.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins

§ 7, stk. 4 í uppskotinum er orðað einsljóðandi við og samsvarar við § 8, stk. 4 í hvítvaskfyriskipanini, sum er soljóðandi:
"Stk. 4. Bestyrelser i virksomheder, som er omfattet af § 1, stk. 1, nr. 1, 3 og 5-6, og som har en intern revision, skal sikre, at den interne revision vurderer, hvorvidt virksomhedens politikker, procedurer og kontroller, jf. kravene i denne lov og regler udstedt i medfør heraf, er tilrettelagt og fungerer på betryggende vis."

Munurin er tilvísingin til § 1, stk. 1.

Hvítvaskfyriskipanin er galdandi á ikki yvirtiknum málsøkjum, men ikki á yvirtiknum málsøkjum, undir hesum realkredittstovnar, sbr. § 1, stk. 1, nr. 2 í donsku hvítvasklógini, lívstryggingarfeløg og tvørgangandi eftirlønargrunnar, sbr. § 1, stk. 1, nr. 4 í donsku hvítvasklógini, tryggingarmeklarar, tá hesir miðla lívstryggingar ella aðrar íløgurelateraðar tryggingar, sbr. § 1, stk. 1, nr. 7 í donsku hvítvasklógini. Nevndu málsøki eru yvirtikin, og tí eru § 1, stk. 1, nr. 2, 4 og 7 strikaðar í § 1, stk. 1 í hvítvaskfyriskipanini, sum sostatt ikki fevnir um hesi øki, sum skulu skipast í løgtingslógini um hvítvask.

Krøvini til innanhýsis grannskoðan og eftirlit eftir § 7, stk. 4 svara til krøvini til tey í kunngerð um grannskoðan av tryggingarfeløgum og fíggjarligum samtøkum, sbr. viðmerkingarnar til § 7, stk. 4, í 2016/1 LSF 41:
"Det foreslås i stk. 4, at bestyrelser i virksomheder, som er omfattet af § 1, stk. 1, nr. 1-7, og som har en intern revision, skal sikre, at den interne revision vurderer, hvorvidt virksomhedens politikker, procedurer og kontroller, jf. kravene i denne lov og regler udstedt i medfør heraf, er tilrettelagt og fungerer på betryggende vis. Hvis en virksomhed har etableret en intern revision, skal denne dermed også varetage revision med kravene i denne lov og regler udstedt i medfør heraf. Om kravene til intern revision henvises til bekendtgørelse nr. 1912 af 22. december 2015 om revisionens gennemførelse i finansielle virksomheder m.v. samt finansielle koncerner."

Viðmerkingarnar til § 8, stk. 4 í 2016/1 LSF 41 eru tí, á sama hátt sum aðrar viðmerkingar til lógaruppskot, tulkingaríkast til uppskotið til § 7, stk. 4 í uppskotinum til nýggja hvítvasklóg.

§ 10, stk. 1, nr. 1, litra a. Innheinting av upplýsingum

LÍV viðmerking:

LÍV vísir á, at Føroyska pensjónsøkið er soleiðis skipað, at arbeiðsgevarar flyta pensjón umvegis afturhaldsskipanina hjá TAKS, og verða sjáldan flutt til ein eftirlønarveitara, saman við samleikaupplýsingum um samanspararan. LÍV metir tískil, at tað hevði verið hóskandi at náðgreina í viðmerkingunum til uppskotið, at samleikaupplýsingar frá TAKS eru at meta sum nøktandi kundakunnleiki í mun til tvungnar pensjónssamansparingar."

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins:
Tað gongur fram av viðmerkingunum til § 11, stk. 1, nr. 1, litra a í 2016/7 LSF 41, at í byrjanarstøðu er tað kundin sum skal lata samleikaupplýsingar, men at tað í førum, har tað er sera avmarkaður váði t.d. arbeisøgevarapensjónir, kann tað vera nøktandi, at fyritøkan innheintar upplýsingar um kundan frá arbeiðsgevaranum.

Í viðmerkingunum til uppskotið verður sett, at tílík føri, har váðin er sera avmarkaður, kunnu t.d. eisini vera tvungnar pensjónssamansparingar, har arbeiðsgevarar flyta pensjón umvegis afturhaldsskipanina hjá TAKS, og har kann tað vera nøktandi, at fyritøkan innheintar samleikaupplýsingar frá TAKS.

§ 10, stk. 1, nr.2: Eftirkanning av upplýsingum

LÍV viðmerking:
LÍV hevur sambært ásetingini skyldu til at eftirkanna samleikaupplýsingar kundans við støði í upplýsingum frá álítandi og óheftari keldu. Í 2016/1 LSF 41 er viðmerkt til § 11, at kravið tekur støði í eini ítøkiligari váðameting og kravið um eftirkanning kann verða ymiskt, alt eftir, um kundin fysiskt hevur verið til staðar ella ikki.

Pensjónsuppsparingar verða vanliga stovnaðar uttan fysiska uppmøting. Serliga í mun til pensjón frá arbeiðsgevarum, tykist tað ógreitt, hvussu ein eftirkanning av samleikaupplýsingunum kann fara fram. Kundin er í teimum førum eyðmerktur við p-tali og TAKS hevur skrásett viðkomandi. LÍV ynskir tískil orðað í viðmerkingunum, at ein eftirkanning av samleikaupplýsingum, sum TAKS útvegar, ikki er neyðug í teimum førum, har talan er um eina pensjónssamansparing í sambandi við starvssetan.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins:
Í 2016/1 LSF 41 eru drúgvar viðmerkingar til § 8, stk. 1, nr. 2 um, hvussu ein eftirkanning av samleikaupplýsingunum kann fara fram. Harumframt er omanfyri nevnda vegleiðing frá Finantilsynet, "Finanstilsynets vejledning om lov om forebyggen og nevndu de foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven)."
Støði má takast í m.a. hesum tilfarinum, tá tað í praksis skal metast um, hvussu umfatandi skjalprógvan, dátur ella upplýsingar skulu vera útvegað, fyri at talan skal vera um nøktandi eftirkanning av kundans samleikaupplýsingum, Tað eru fyritøkurnar, sum í praksis í hvørjum føri sær skulu meta um og taka støðu til, um eftirkanningin av upplýsingum er nøktandi, undir hesum um ein víðari eftirkanning av samleikaupplýsingum, sum eru fingnir til vega frá TAKS, ikki er neyðug í teimum førum, talan er um eina pensjónssamansparing í sambandi við starvssetan. Tað er ivasamt, um tað er nøktandi í eini viðmerking generelt at undantaka frá skylduni at gera eina ítøkiliga meting í teimum førum, talan er um eina pensjónssamansparing í sambandi við starvssetan, og tað kann eisini skapa iva um, hvørt lóggávan hesum viðvíkjandi er nøktandi í mun til altjóða tilmæli á hesum økinum.

§ 11, stk. 1: Upplýsingar um njótunartilskilaða

LÍV viðmerking:

"Sambært § 11, stk. 1 í uppskotinum skal njótunartilskilaður, sum er ónevndur, eyðmerkjast í seinasta lagi á útgjaldsdegnum. Samstundis verður í viðmerkingunum s. 36 skrivað soleiðis: "Á lívstryggingarøkinum verður skotið upp, at kundakunnleikamannagongdirnar harafturat fevna um, at fyritøkurnar við stovnan av kundasambandinum skulu kenna navnið á njótunartilskilaða."

Tryggingarveiting við deyða verður vanliga útgoldin til næsta avvarðandi, um ikki onnur avtala er gjørd.

Hugtakið næsti avvarðandi er lýst í § 105, stk. 5 í løgtingslóg um tryggingaravtalur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 31. mars 2017. Í flestu førum verður LÍV tískil ikki kunnað um navnið á njótunartilskilaða.

Hóskandi hevði tí verið at nágreina viðmerkingina á s. 36, soleiðis at tað eins og í § 11, stk. 1 framgongur, at njótunartilskilaður kann vera ónevndur."

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins:

Í viðmerkingunum á s. 36 er hetta sett inn:
"Er talan um ein ónevndan persón ella eina fleirheild av persónum, skulu nøktandi upplýsingar útvegast til at kunna eyðmerkja tann ella teir njótanartilskilaðu útgjaldingardagin."

§ 13, stk. 5: Avtaluslit

LÍV viðmerking:

"Avleiðingin av vantandi kundakunnleika er sambært § 13, stk. 5, at handilssambandið skal slítast ella gerast upp og flytingar steðgast. Tó so, er galdandi í Føroyum, at øll við lønarinntøku skulu rinda eftirløn, sum ikki kann útgjaldast i úrtíð. Eitt avtaluslit sýnist sostatt ikki vera í tráð við eftirlønarlógina § 1, stk. 1 og § 9, stk. 1.

Mælt verður tí til, at tað í viðmerkingunum framgongur, hvussu eftirlønarveitarar eiga at handhevja § 13, stk. 5, um krøvini um kundakunnleikamannagongd ikki kunnu gjøgnumførast."

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins:

Víst verður til viðmerkingarnar til § 14 í 2016/1 LSF 41:
"Det foreslåede stk. 5 fastsætter dermed en pligt for virksomheder og personer til i visse tilfælde at afbryde eller afvikle en forretningsforbindelse. Det bemærkes hertil overordnet, at bestemmelsen eller dette lovforslag ikke i øvrigt regulerer en virksomheds eller persons adgang til at afslå indgåelse af kundeforhold eller adgangen til at afbryde eller afvikle forretningsforbindelsen. Hvorvidt der i øvrigt er adgang til at afslå indgåelse, afbryde eller afvikle en forretningsforbindelse, kan således være reguleret i anden lovgivning eller i kontrakten med kunden."

Í § 14 í lógaruppskotinum eru ásetingar um, hvørji tiltøk skulu setast í verk í førum, har tað ikki er heimild í lógaruppskotinum at slíta ella niðurlaga handilsambandið. Víst verður eisini til viðmerkingarnar til § 15 í 2016/1 LSF 41.

§ 15, stk. 1: Kunning áðrenn handilssamband

Viðmerking LÍV:

"Eftir uppskotinum skal ein møguligur kundi kunnast um viðgerð av persónsupplýsingum, við atliti at hvítvaski og fígging av yvirgangi, áðrenn handilssambandið verður stovnað.

Í pensjónshøpi hevur veitarin vanliga ongan kunnleika til kundan, áðrenn fyrsta gjaldið er móttikið. Natúrligt er tí, at tað ikki er møguligt at útvega kundanum kunning um viðgerð av persónsuppplýsingum áðrenn kundasambandið er stovnað. Í staðin er vanlig mannagongd, at kundin fær sendandi viðkomandi kunning, eftir at fyrsta inngjaldið er skrásett. LÍV skjýtur upp, at tað framgongur í uppskotinum, at ein slík mannagongd er nøktandi til tess at lúka treytirnar í § 15, stk. 1."

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins:

Fyritøkurnar hava ikki skyldu at lúka treytir, sum tað ikki er møguligt at lúka, og tað framgongur longu av verandi lóg og viðmerkingunum til lógina, hvussu kravið kann lúkast, sbr. § 15 í 2016/1 LSF 41:
"Det, at kunden skal informeres om de regler, der gælder for behandling af personoplysninger efter denne lov, betyder, at virksomheder og personer f.eks. kan indbefatte oplysningerne i de generelle regler og vilkår i den kontrakt, der indgås med kunden. Det vil ikke være tilstrækkeligt, at kunden selv kan finde informationerne på en hjemmeside."

§ 60: Gildiskoma

Viðmerking LÍV:
Verður uppskotið samtykt, fær lógin ætlandi gildi 1. juli 2020. LÍV mælir til, at gildiskoman verður útsett til talgildi samleikin til føroyingar gerst veruleiki. Talgildur samleiki ger tað møguligt hjá borgarum at eyðmerkja seg hjá fyritøkum. Hetta merkir sostatt eisini, at tað gerst smidligari hjá fyritøkuni at lúka krøvini um kundakunnleikamannagongd. Ætlanin við talgilda samleikanum er, at tað skal vera ein trygg loysn, nettupp soleiðis at skipanin lýkur krøvini, sum Fíggjareftirlitið setur í mun til hvítvask og fígging av yvirgangi.

LÍV metir tað vera skilabest, at samanhangur verður millum lógaruppskotið, sum fyriliggur, og verkætlanina Talgildu Føroyar.

Viðmerkingar Umhvørvis- og vinnumálaráðsins:
Aftaná hoyringina er gildiskoman sett til 1. januar 2021,